# Vit vilja hava fleiri túrar um Leirvíksfjørð

**Fleiri túrar um Leirvíksfjørð og trygd fyri, at vit kunnu levera til tíðina, hevur stórri týdning fyri okkum, enn prísurin á ferðaseðlunum. Sum nú er, verður peningurin kortini etin upp í longu bíðitíðini á ferjulegunum, siga vinnulívsmenn úr Norðoyggjum**

TÆNASTUSTØÐI
*Rúna Sivertsen*



**Norðoyggjar:** Nú Strandferðslan boðar frá bæði príshækking og færri túrum, fer hetta at merkja túsundtals mistar krónur fyri landskassan. Strandferðlan skal heldur syrgja fyri, at túratalið um Leirvíksfjørð verður so høgt, at sleppast kann undan bíðitíð.

Hetta siga vinnulívsmenn úr Norðoyggjum, sum meina, at tað er púrasta burturvið, tá hugsað verður um, hvønn týdning vinnulívið og serliga fiskaútflutningurin í Norðoyggjum hevur fyri alt landið.

Um Strandferðslan harafturímóti syrgir fyri at bjóða okkum eina trygga tænastu, hevur prísurin fyri túrin ikki so stóran týdning, tí tað er bíðitíðin, sum í seinasta enda kostar pening og mista inntøku.

*- Hvønn einasta dag missir landskassin skattakrónur, tí ferðasambandið um Leirvíksfjørð ikki er nøktandi. Men hetta tykast teir ráðandi enn ikki at hava skilt, siga vinnulívsmenn úr Norðoyggjum*

Skulu vit gera okkum vónir um at halda okkara avtalur, bæði her heima og uttanlands, mugu vit kunna bjóða eina trygga leveransu.

Tað er ófatiligt fyri okkum, sum eru handilsmenn, at teir ráðandi, bæði politikarar og leiðslan á Strandferðsluni, ikki skilja hetta fyri okkum so einfalda handilsprinsipp.

At politikararnir eru so lítið tilvitaðir um, hvørnn týdning tað hevur fyri útflytarar og vinnuna alla, at sleppast kann undan bíðitíð og seinkingum, er okkum púra óskiljandi, siga teir.

Fyri at loysa trupulleikan um Leirvískfjørð, setti Strandferðslan Sam í sigling. Men Sam byrjar siglingina ov seint um morgnarnar, og endar siglingina ov tíðliga seinnapartar.

Virkini her norðuri hava stórar trupulleikar av hesum. At hetta er ein landstrupulleiki, tykast teir ráðandi als ikki at skilja.

Hvønn einasta dag missir landskassin pening orsaka av hesum fløskuhálsi, sum enn er ein stórur trupulleiki her norðuri, siga altso vinnulívsmenn í Norðoyggjum.

# Umhvørvisdálking kann elva til krabbamein 30 ár aftaná

**PCB, sum dálkaði fisk og skeljadýr fyri 30 árum síðani, er ein týðandi orsøk til, at ungir menn fáa krabbamein í steinunum í dag. Tað er niðurstøðan í einari svenskari kanning.**

DÁLKING OG HEILSA
*Árni Joensen*

Altsamt fleiri og fleiri ungir menn fáa krabbamein í steinunum, og ein stór orsøk til hetta kann vera, at mammur teirra fingu umhvørviseitur sum eitt nú PCB við at eta fisk og skeljadýr, tá tær gingu við børnunum. At synir teirra fáa krabbamein í steinunum, er eitt tekin um, at eitranin kann gera seg galdandi heili 30 ár aftaná.

Hetta er niðurstøðan í einari svenskari kanning. Lennart Hardell, professari, sum hevur staðið fyri kanningini, ivast ikki í, at samband er millum teir nógvu tilburðirnar av krabbameini í steinunum og tað stóra útlátið av umhvørviseitrandi evnum í árunum síðani seinna heimsbardaga.

Lennart Hardell sigur, at dálkingin hevði við sær, at nógvastaðni gjørdust fiskur og skeljadýr eitrað, og hesin matur var so eitrandi, at synirnir hjá teimum kvinnunum, sum ótu hendan matin, meðan tær vóru við barn, eru í fýra ferðir størri vanda fyri at fáa krabbamein í steinunum enn aðrir ungir menn.

Frøydis Landmark í norsku krabbameinsskrásetingini sigur, at niðurstøðan í svensku kanningini er ræðandi. Hon vísir á, at seinastu árini eru tilburðirnir av krabbameini í steinunum fimmfaldaðir í Noregi, og at hetta slagið av krabbameini er tað mest vanliga millum ungar norskar menn í dag.

Frøydis Landmark sigur, at úrslitið av svensku kanningini vísir, at tað er ikki bara skeiv ella vánalig lívsførsla, sum er orsøkin til, at fólk fáa krabbamein, men at umhvørvisdálking eisini er ein orsøk. Norsku myndugleikarnir ráða í dag fólki frá at eta skeljadýr og fisk, sum er veiddur á ávísum norskum firðum orsakað av PCB-dálking.

# Nógvar framsýningr í Ribarhúsi



FRAMSÝNING
*Ribarhús í Fuglafirði*

Eitt nýtt ár er byrjað , eisini hjá gallarí Ribarhúsi.

Síðsta ár varð gallaríið sera væl vitjað, og vóru 12 framsýningar í húsinum.

Fyrsta framsýning í ár letur upp 25. januar, og er tað kendi listamaðurin, Jan Ulrik Friis, ið sýnir fram umleið 25 oljumálningar. Síðst í februar verður tað Ester Hansen úr Gøtu, ið fer at vísa fram tekningar og málningar.

í mars fer havnarmaðurin, Eli Smith at sýna fram, og fyrst í aprílmánaði fer Olivur við Neyst at sýna fram.

Seinnapartin í apríl fer fuglfirðingurin Helgi Midjord at sýna fram.

Hálvan mai fáa vit vitjan av Jógvani Asbjørn Skaale, sum vit ikki hava hoyrt nógv frá í seinastuni, so tað verður óiva spennandi.

Í juni verður onkur framsýning við luttøku av næmingum frá Fuglafjarða Skúla.

Juli er mánaðurin, tá Varmakelda er, og í ár verður Fuglafjørður saman við Klaksvík eisini karmur um Nordvesten tiltakið, ið verður hildið annaðhvørt ár.

Í gallarínum verður framsýning við norðurlendskum listafólki.

Í august og september verður eisini okkurt spennandi, men er ikki komið upp á pláss enn.

Síðst í oktober til síðst í november verður tað Kári Svensson, ið fer at sýna fram.

Í desember verður eisini onkur framsýningin

Annars eru eisini tónleikatiltøk av og á í húsinum, og verður hetta eisini í ár.



# Svínarí við ongari fjølmiðlaábyrgd

**Almennu fjølmiðlarnir koma undir økið hjá Løgtingsins umboðsmanni, staðfestir Joen H. Andreasen. Men journalistikkur hóskar seg illa til umboðsmannin, sum harðliga átalar, at ongin fjølmiðlaábyrgdarlóg er galdandi í Føroyum. Hann himprast við at fara út í mál, har journalistikkurin stendur fyri skotum**

FJØLMIÐLAR
*Ingi Rasmussen*



*– Tá vit tosa um almennar fjølmiðlar, sum eru upprættaðir fyri almennar pengar, so er avmarkað, hvussu nógv teir kunnu loyva sær av einsíðugheit. Um tað er heilt upplagt, at teir eru farnir út um sínar avmarkingar, so kann umboðsmaðurin tala at. Men slík mál áttu heldur at verið viðgjørd í einari fakliga samansettari kærunevnd, sigur Joen H. Andreasen.*

Javnan verður funnist at fjølmiðlunum. Teir verða lagdir undir at renna ørindi, at fara ov harðliga fram og at vera ósakligir. Men borgarin hevur ongastaðni at venda sær, um hann heldur seg vera fyri órætti í føroyskum miðlum. Orsøkin er, at føroyingar hava onga fjølmiðlaábyrgdarlóg, sum okkara grannalond hava.

Tað heldur Løgtingsins umboðsmaður lítið um.

– Tað líkist ongum, at lógin um góðan fjølmiðlasið og fjølmiðlanevnd framvegis ikki er komin í gildi fyri Føroyar, sigur Joen H. Andreasen.

Hann er óvanliga bersøgin, tá talan kemur inn á ta fjølábyrgdarlóg, sum framvegis ikki hevur vunnið vegin fram í Føroyum. Løgtingsins umboðsmaður hevur heimild til at vísa á brek í lóggávuni av sínum eintingum. Og hesa heimild hevur hann brúkt í sambandi við fjølmiðlaábyrgdina.

– Eg havi tvær ferðir gjørt vart við, bæði mótvegis løgmanni, løgtingi og avvarandi landsstýrismanni, at tað er eitt brek í lógini um kringvørp, at hon vísir til eina fjølmiðlaábyrgdarlóg, sum ikki er til. Tað er nakað svínarí, sum eg havi biðið avvarðandi myndugleikar fingið í rættlag, sigur Joen H. Andreasen.

## Tungur burður

Fjølmiðlaábyrgdarlógin skal tryggja øllum borgarum, høgum sum lágum, rættvísa viðferð í fjølmiðlunum. Hon skal seta karmarnar hjá eini nevnd við fakfólkum og umboðum fyri almenningin, sum skal meta um kærir og skal seta etisk krøv til føroyskar fjølmiðlar.

Men framvegis er ongin lóg í eygsjón, hóast hon fyrstu ferð kom á borðið hjá landsstýrinum í 1992.

Talan er um eitt danskt málsøki. Í 1991 varð ein fjølmiðlaábyrgdarlóg sett í gildi í Danmark, og í 1992 spurdi Løgmálaráðið, um føroyska heimastýrið vildi hava ta donsku lógina setta í gildi í Føroyum. Landsstýrið tók málið upp í 1995, og í 1997 varð uppskot lagt fyri løgtingið. Løgtingið samtykti eitt nógv broytt uppskot, sum var sent aftur til Danmarkar. Men ov nógvar broytingar vóru framdar, t.d. í samansetingini av fjølmiðlanevndini, sum gingu ímóti andanum í lógini. Tí sýtti Løgmálaráðið at seta lógina í gildi.

Í 2000 varð aftur roynt. Løgtingið bað nú í staðin landsstýrið um at seta eina nýggja føroyska lóg í gildi. Í mars 2001 legði landsstýrið so uppskot um góðan fjølmiðlasið fyri tingið, men tað varð tikið aftur longu í mai mánaði. Helst tí talan var um málsøki, sum føroyingar ikki hava lóggávuvald á.

Síðan hevur onki meira verið at hoyrt til fjøtraðu lógina.

## Undir fyrisitingini

Nú er fjølmiðlaábyrgdarlógin aftur frammi í sambandi við eitt mál millum Útvarp Føroya og formannin í Føroya Fiskimannafelag, Óla Jacobsen, sum heilar tríggjar ferðir hevur stevnt útvarpið inn fyri Løgtingsins umboðsmann. Í hesum sambandi hevur Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, reist iva um, hvørt Løgtingsins umboðsmaður er tann rætti at viðgera journalistikk í almennu miðlunum.

Løgtingsins umboðsmaður er púra avgjørdur: Hann hevur heimild at viðgera mál um almennu loftmiðlarnar. Men í somu vending himprast hann við at fara út í mál, har tað er ein ivaspurningur, um journalistiskar grundreglur verða hildnar.

– Útvarpið og Sjónvarpið eru almennir stovnur, sum eru at rokna við til almennu fyrisitingina undir heimastýrinum. Tað merkir, at loftmiðlarnir eru partar av heimildarøki umboðsmansins, staðfestir Joen H. Andreasen.

Hóast hann sostatt hevur myndugleikan, heldur hann kortini ikki, at mál av hesum slag eru serliga vælegnað til umboðsmansviðgerð, tí førleikin er avmarkaður.

– Tá vit tosa um almennar fjølmiðlar, sum eru upprættaðir fyri almennar pengar, so er avmarkað, hvussu nógv teir kunnu loyva sær av einsíðugheit. Um tað er heilt upplagt, at teir eru farnir út um sínar avmarkingar, so kann umboðsmaðurin tala at. Men slík mál áttu heldur at verið viðgjørd í einari fakliga samansettari kærunevnd, sigur Joen H. Andreasen.

Sostatt eru almennu miðlarnir undir eftirliti, men privatu miðlarnir, eitt nú blaðið tú situr við í hondini, eru púrast uttan fyri øll etisk og journalistisk krøv, onnur enn tey, sum fjølmiðlarnir sjálvir seta sær. Til fjølmiðlaábyrgdarlógin kemur.

# Umboðsmaðurin fegnast um danskt samstarv

**Løgtingsins umboðsmaður, Joen H. Andreasen, fegnast stórliga, nú Fólkatingsins umboðsmaður er vorðin setiumboðsmaður í Føroyum**

EFTIRLIT
*Ingi Rasmussen*

Formansskapurin í løgtinginum hevur fingið í lag samstarv við Folkatingsins umboðsmann, so hesin tekur yvir í málum, har tað berst føroyska umboðsmanninum frá.

Tað er ikki føroyski umboðsmaðurin sjálvur, sum hevur tikið hetta stigið, men hann fegnast stórliga um valið hjá løgtinginum.

– Eg havi havt eitt mál, har eg sambært fyrisitingarlógini havi verið ógegnigur. Í tí sambandinum gjørdi eg formansskapinum vart við, at vit skulu hava ein setiumboðsmann, og eg kann illa hugsað mær nakað betri val enn tann danska umboðsmannin, sigur Joen H. Andreasen.

Í einum lítlum samfelag sum tí føroyska, har viðurskiftini eru smá, eru skjótt at áhugamál og ættarbond koma í vegin fyri gegninum. Tí hevur verið neyðugt hjá einum lítlum stovni sum Løgtingsins umboðsmanni at finna ein avloysara fyri Joen H. Andreasen, sum er fyrsti umboðsmaður føroyinga.

Tá valið fall á Joen H. Andreasen var tað grundað á, at hann við sínum drúgvu royndum í Føroya rætti, helst er tann einasti, ið hevur tað neyðuga álitið og tignina, sum krevst, fyri at avgerðir hjá umboðsmanninum verða virdar.

Tí helt formansskapurin eisini, at tað var skeivt at fara út at leita eftir einum avloysara í Føroyum, hvørja ferð tað barst føroyska umboðsmanninum frá at viðgera eitt mál.

Danski umboðsmaðurin er Hans Gammeltoft Hansen, sum hevur stóra virðing millum fólk, og hansara avgerðir verða virdar at donsku fyristingini, sum hann hevur eftirlit við.

Joen H. Andreasen og Hans Gammeltoft Hansen hava frammanundan havt eitt óformligt samstarv, har tað altíð hevur staðið føroyska umboðsmanninum í boðið at ringt til sín danska starvsfelaga at biða um góð ráð og hjálp.

Nú er hetta samstarv gjørt formligt, soleiðis at danski umboðsmaðurin er setiumboðsmaður í Føroyum.